

**Prísur úr: kr. 214.150,-**

# Opel Vivaro flytur mørk

At donsku grannar okkara valdu Opel Vivaro sum »Ársins vøruvogn« í 2002, var ikki av tilvild. Vivaro er eitt modell, sum hevur flutt mørk og hert krøvini til júst hetta slagi av bilum, ið nógv meira krevst av, síðani Vivaro kom á marknaðin

Niður í smálutirnar er framleiðslan av Opel Vivaro trygdartryggjað, og tann, ið hevur stóran flutningstørv, kann nú røkja sítt arbeiði og fáa eitt satt njótilsi samstundis. Tað er ikki øðrvísi at koyra í persónbili, enn tað er at koyra í Opel Vivaro.

Somuleiðis er Vivaro fyrsti vøruvognurin við seks girum, og er tað ein av orsøkunum til, at bilurin er so bíligur í rakstri, samstundis sum hann orkar og kann tað, ið kravt verður av einum vøruvogni nú á døgum.

Opel Vivaro fæst bæði sum vanligur vøruvognur og sum kombi- ella minibussur í tveimum longdum.

P/f Meinhardt Arge:

# Opel Combo – eitt framúr flutningstól til gerandisuppgávurnar

**Opel Combo ein vørubilur ið er bíligur rakstri og við øllum teimum eginleikum, tær tørvar, um tær tørvar eitt framúr flutningstól til gerandisuppgávurnar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast nógvir eru um boðið, er tað eingin annar av bilunum í sama flokki, sum hevur líka gott pláss fyri viðføri sum Opel Combo. Verður setrið høgrumegin lagt niður í Cargo útgávuni, fæst eisini longsta lastarrúmdin yvirhøvur í bólkinum.

Opel Combo lastar heilt upp í 850 kilo og rúmar heilt upp í 3.200 litrar, umframt at eindir upp í 2,70 metrar í longd sum einki ganga í hann. Hartil er ein 62 cm breið dragihurð á síðuni, ið gevur fleiri møguleikar, tá fyllast skal í bilin.

Til Opel Combo fæst ein ørgrynni av eykaútgerð, ið lættir um allar arbeiðsuppgávur. Við øðrum orðum ein bilur, ið kann snikkast júst eftir tørvinum í hvørjum einstøkum føri.



**Prísur úr: kr. 142.150,-**

# Finn tann rætta Opel Movano til tín tørv

Vinnurekandi við tørvi á góðum flutningsamboðum kunnu frøast um teir møguleikar, ið Opel Movano kann geva teimum. Hesin bilurin er nýggjasta íkastið hjá Opel til alsamt vaksandi tørvin á fjølbroyttum vøruvognum

Hóast Movano er ein stórur vørubilur, er hann lættur at koyra og lasta, og innan er hann útgjørdur sum ein annar persónbilur. Júst hetta er nakað, ið ger tað hugaligt at røkja arbeiðsuppgávur við einum Opel Movano.

Alt eftir, hvat tú hevur brúk fyri, kanst tú uttan iva finna júst tað rætta modellið til tín tørv, tí Opel Movano fæst í fleiri grundútgávum, ið hvør hevur sína styrki, so sum ymsa vekt og hædd.

Opel Movano fæst bæði sum kassavognur, Chassis og Combi.

**Prísur úr: kr. 215.150,-**







Opel Vectra Wagon:

# Ein av størstu og rúmligastu stationcar á marknaðinum

**Opel Vectra Wagon er loysnin hjá nútímans bileigarum, ið seta krøv. Bilurin er heilar 22 cm longri enn Vectra sedan og er ein av rúmligastu og mest liðiligu bilum í sínum klassa**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Opel Vectra Wagon er ein av størstu og rúmligastu stationcar á marknaðinum. Umframt at viðførisrúmið er sera stórt, er beinplássið í kabinuni sum í eini stórari luksus-limousinu.

Vectra Wagon er loysnin hjá nútímans bileigaranum, ið setur krøv. Bilurin skal gjarna vera spegilsmynd av teimum virðum, tú metir høgt, og júst tað livir Vectra Wagon væl og virðiliga upp til, samstundis sum nýggjasta tøknin kemur til sín rætt.

Bilurin er sniðgivin og innrættaður, so hann í samanberingini við aðrar líknandi bilar er í serflokki. Klassiskur og tó nýskapandi, og tí eitt gott val hjá tí kræsna, ið vil hava ein bil við dygdum og trygd av besta slagi.



Opel Astra Classic:

# Eitt sera gott tilboð

Hóast nýggjur Opel Astra er komin á marknaðin, steðgar framleiðslan av forgangaranum ikki. Hann verður framvegis gjørdur sum hatchback við 5 hurðum og sum stationcar undir navninum Astra Classic.

Astra Classic er eitt sera gott tilboð. Bilurin er væl útgjørdur og kann við fullum rætti kappast við aðrar nýggar bilar í sínum klassa.

Astra Classic verður gjørdur sum liður í eini nýggjari stratigi hjá Opel, har teir skulu kappast við aðrar bíligar bilar í marknaðinum.

Hann hevur t.d. fult galvaniserað karossarí við 12 ára garanti, trygdarpedalir sum verja beinini við ein frontalan samanstoyt, airbag framman, í síðunum og gardinairbag.

Bíligasti Astra Classic h/b við 1,4 litur bensinmotori og 90 hk kostar einans kr. 159.800. Við 1,6 litur við 105 hk bensinmotori kostar bilurin kr. 169.800.

Við í prísinum hevur Astra Classic t.d. radio við fløguspælara. Aircondition fæst fyri kr. 6.000 eyka.

Opel Astra Wagon:

# Elegantur og rúmligur stationcar

Nýggi Opel Astra, sum fyri stuttum kom á marknaðin, fæst nú sum stationcar, ið er tann rúmligasti í sínum klassa. Opel hava gjørt sær serligan ómak við hesum bilinum

Aksilfrástøðan er heilar nýggju cm longri enn á forgangaranum. Hetta gevur munandi betur pláss í kabinuni. Baksetrið kann flytast 10,5cm aftur og fram, hetta fyri at geva betur beinpláss aftan ella størri viðførisrúm.

Við baksetrinum lagt niður verður vørurúmið heilar 2,75m langt.

Astra stationcar fæst við fimm ymiskum bensinmotorum frá 1,4 litur við 90 hk til 2,0 litur við 200 hk, og dieselmotorarum frá 1,7 litur CDTi við 80 hk til 1,9 litur CDTi við 150 hk.

Viðførisrúmið er 530 litrar og 1.570 litrar við baksetrinum lagt niður.

